# Flogbóltskapping á Tvøroyri

Í vikuskiftinum verður stór flogbóltskapping í yngru deildunum á Tvøroyri. Kappast verður í Ítróttarhøllini og í fimleikahøllini, og vanligu reglurnar verða ikki nyttar. Vanligt er at um tað stendur á jøvnum eftir 4 sett, har tað verður spælt upp til 25 stig, skal eitt fimta sett til, fyri at avgera dystin. Hetta settið gongur vanliga upp til 15 stig. Í kappingini leygardagin verður kappast upp til 21 í hvørjum setti, og í triðja setti verður spælt upp til 15. Hetta fyri at gera kappingina áskoðaravinarliga og fyri at avgreiða allar kappingarnar innan eitt rímuligt tíðarbil. Fyrireikarnir duga at siga at kappingin er sera væl umboðað, og at tað ikki áður hava verið so nógvir íðkarar til eina slíka kapping. Fyrsta kappingin byrjar klokkan 8:30 leygarmorgunin í fimleikahøllini, har bólkurin Dreingir 10 ár seta hol á kappingina har. Í ítróttarhøllini byrja kappingarnar kl 9:00. Tað ljóðar frá fyrireikarunum, at teir vóna at nógv fólk møtir upp og stuðla tiltakinum og heppa á ungdómin í oynni, ið fer at mynda framtíðina í føroyskum flogbólti



KÍF-SÍ 1-3 (25-19, 19-25, 22-25, 14-25)

# Triðji sigur á rað

**Sørvágskvinnur vóru á vitjan hjá KÍF í Kollafirði mikukvøldið, og haðani fóru tær vestur aftur við viðførinum, góðum hýri og stigunum í skjáttuni**

FLOGBÓLTUR
Niels Petersen
niels@sosialurin.fo

Sørvágskvinnur hava bert tapt tann eina dystin í ár, og tað var í øðrum umfari, tá tær spældu á Kambsdali móti ÍF. SÍ vann sín fyrsta dyst á árinum, og eftir tapið móti ÍF, hava tær vunnið tríggjar sigrar á rað.

### Tykjast fjálturstungnar

Leikgongdin í fyrsta setti minti ikki sørt um útidystin móti ÍF, har SÍ løgdu væl fyri frá byrjan, fyri síðani at gera ov nógvir býttar feilir og tapa settið. Góðar servur, kvikt verjuspæl, blokkurin stendur væl og góð álop, serliga um miðjuna, vinnur settið fyri KÍF.



*Karin Mikkelsen, ið saman við liðfeløgum sínum hava vunnið tríggjar dystir á rað*

### Rokeringar virka

SÍ framdi rokeringar og styrktu blokkin mitt fyri, og tað vendi hóttandi gongdini. Sørvágskvinnur fingu tak á góðu álopunum hjá KÍF, og SÍ spælið gerst tryggari, meðan KÍF byrja at fáa trupulleikar við móttøkunum. Settið verður vunnið av SÍ og leiðin tykist stungin út í kortið.

Triðja settið gerst tó nokkso tætt, men at enda menna SÍ seg og vinna við trimum stigum.

Í fjórða setti var ongin ivi um nakað. SÍ stýrdi frá byrjan til enda. Samanumtikið hava SÍ, fleiri streingir at spæla uppá og vinna tí ein rættiliga tryggan sigur, men hann er ikki sannførandi. Spælið verður ongantíð leikandi lætt, móti einum, til tíðir, vælleikandi KÍF-liði.

## FAKTA

Stigatalvur hjá ávíkavist kvinnum og monnum:

**Meistaradeild kvinnur:**

| | D | V-T | Sett+/- | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1SÍ | 6 | 5-1 | 17-6 | 11 | 10 |
| 2 ÍF | 5 | 5-0 | 15-5 | 10 | 10 |
| 3 KÍF | 6 | 3-3 | 13-11 | 2 | 6 |
| 4 Dráttur | 5 | 3-2 | 10-9 | 1 | 6 |
| 5 TB | 6 | 2-4 | 8-12 | -4 | 4 |
| 6 Mjølnir | 4 | 0-4 | 4-12 | -8 | 0 |
| 7 Fleyr | 4 | 0-4 | 0-12 | -12 | 0 |

**Meistaradeild menn:**

| | D | V-T | Sett+/- | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 5 | 4-1 | 13-4 | 9 | 8 |
| 2 SÍ | 5 | 4-1 | 14-6 | 8 | 8 |
| 3 ÍF | 3 | 2-1 | 6-6 | 0 | 4 |
| 4 Fram | 4 | 1-3 | 5-9 | -4 | 2 |
| 5 Fleyr | 5 | 0-5 | 2-15 | -13 | 0 |

## FAKTA

Dystirnir í Meistaradeildini hjá kvinnum og monnum, hetta vikuskiftið, verða:

**Meistaradeild kvinnur:**

| | Dato | Kl. | Stað |
|---|---|---|---|
| Dráttur-Mjølnir | 25/11 | 14:00 | Giljanes |
| ÍF-Fleyr | 25/11 | 14:00 | Kambsdalur |

**Meistaradeild menn:**

| | Dato | Kl. | Stað |
|---|---|---|---|
| Fleyr-SÍ | 25/11 | 16:00 | Gundadalshøllin |
| ÍF-Fram | 25/11 | 16:00 | Kambsdalur |

# Bruce ikki við á Emirates

**Steve Bruce, ið er nýggjur venjari hjá Wigan, sleppur ikki at standa við stírisvøðlin hjá Wigan, tá liðið fer á vitjan hjá Arsenal á Emirates leikvøllinum í London**



*Steve Bruce, í hansara tíð í Birmingham City F.C.. Hann hevur nú skift til Wigan Athletics F.C.*

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Wigan mátti gjalda á leið 3 milliónir ensk pund (30 mió. krónur) fyri at loysa Steve Bruce úr sáttmála hansara í Birmingham City F.C., men hann sleppur ikki at stýra Wigan enn, tí Birmingham vilja vera við, at Wigan má gjalda 220.000 pund afturat, fyri at handilin kann verða gjøgnumførdur endaliga.

### Arsenal og United

Arsenal taka ímóti Wigan, meðan Manchester United fara á vitjan á Reebok Stadium, har Bolton eru vertir. Av teimum báðum, hevur Arsenal tey betru kortini á hondini, tí teir spæla heima móti botnliðnum Wigan, meðan United mugu á trupla uppgávu móti Bolton, ið hevur tað fyri at arga tey stóru liðini í Premier League.

### Torres kanska munurin

Michael Owen hevði ivaleyst dámt væl at skorað móti sínum gomlu liðfeløgum, men hansara skaðar í seinastuni forða honum, tí hann verður ikki við leygardagin, tá Liverpool koma á vitjan á St. James Park í Newcastle.

Í staðin kann tað gerast Fernando Torres, ið fer avstað við yvirskriftunum. Fernando Torres hevur verið ein ordans fongur hjá Liverpool, síðan skiftið frá Atletoco Madrid. Hann hevur skorað átta mál í fjúrtan dystum, og má tað sigast at vera heilt hampuligt.

Torres hevur eins og Owen, havt trupuleikar av skaðum, men hann er nú klárur aftur, eftir at hann ikki spældi landsdyst fyri Spania, mikukvøldið.

### Chelsea byrjar at hótta

Chelsea fara leygardagin til Derby á vitjan. Og alt annað líka, má man meta at teir eru klassar betur enn Derby. Í øllum førum hvat lønum viðvíkur, eru Chelsea leikararnir fleiri ferðir hægri enn teir hjá Derby. Chelsea eru á einum fjórða plássi, fimm stig aftanfyri Arsenal og Manchester United.

### London uppgerð

Sunnudagin verður so eitt av sløgunum um London, tá West Ham vera vertir fyri Tottenham, ið hevur fingið eina góða byrjan undir nýggja venjaranum, spaniólanum Juande Ramos. Tottenham hevur ikki tapt undir leiðslu av Ramos, og mugu teir sigast at vera eitt slag av favoritti, ímóti einum West Ham liði, ið liggur sum nr. tíggju á stigatalvuni.